## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt, men leygardagin fránskar hann vindin av suðri og regn. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Borgarstjórarnir í Útnorði hittust

**Í síðstu viku hittist grunnurin fyri Nuuk-Reykjavík-Tórshavn í høvuðsstaðnum. Grunnurin hevur til endamáls at geva pening til persónar, fyritøkur, ítróttarfeløg, virkir ella líknandi, ið arbeiða fyri at styrkja samstarvið millum teir tríggjar høvuðsstaðarnar í Útnorði**

GRUNNUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn hittist herfyri við borgarstjórunum í Nuuk og Reykjavík, í sambandi við árligu útbýtingina av peninginum í Nuuk-Reykjavík-Tórshavn grunninum.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

– Aðalmálið hjá grunninum er at veita pening til størri fatan millum teir tríggjar høvuðsstaðarnar, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

– Hvørt árið leggur hvør kommuna minst 100.000 krónur í grunnin, sum vit síðani býta út til umsøkjararnar. Ein og hvør kann søkja, men tað skal verða í tráð við endamálsorðingina.

Í ár hittist grunnurin so í Havn, og næsta ár kemur grunnurin saman í Reykjavík. Soleiðis verður skift um at hittast í teimum trimum høvuðsstøðnunum.

– Ein kann siga, at hetta er eitt vinarbýarsamstarv við einum endamáli. Tá talan er um vinarbýir kemur ein sum oftast saman fyri at hugna sær og práta saman, men í hesum sambandi hava vit so eina orsøk.

Jan Christiansen sigur, at á henda hátt kann ein eisini skapa sær sambond til embætisfólk í høvuðsstøðunum.

Allir borgarar í kommunum kunnu søkja, men grunnurin hevur tilskilaðan rætt til at nokta at lata pening og hevur eisini rætt til at geva alla peningaupphæddina til ein persón, ítróttarfelag virki ella annað.

– Ein slíkur grunnur styrkir samstarvið millum høvuðsstaðirnar, sigur Jan Christansen at enda.


variant

Galvaniseraðir viðfestisvognar



Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

osi i o u

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820


### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | 22 |
| Halifax | 19 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 18 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 30 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | |
| Buenos Aires | 10 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa í útsynning úr Føroyum fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer í landsynning og kaldara og klárari luft rekur av norði móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/06 kl. 06⁰⁰– 01/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,6°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 30/06 kl. 06⁰⁰– 01/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 72,6 mm


Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

BILLUTIR



F
F
tlf. 421605 fax 421666


## VESTFALLSKYRRINDI

2. juli: Seinna kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. juli | 01.13 | 13.37 | 00.13 | 12.37 | 00.28 | 12.52 | 03.13 | 15.37 | 04.13 | 16.37 | 11.52 | — | 10.52 | 23.23 | 01.28 | 13.52 | 02.28 | 14.52 | 00.58 | 13.22 | 02.13 | 14.37 |
| 3. juli | 02.08 | 14.40 | 01.08 | 13.40 | 01.23 | 13.55 | 04.08 | 16.40 | 05.08 | 17.40 | 00.23 | 12.55 | 11.55 | — | 02.23 | 14.55 | 03.23 | 15.55 | 01.53 | 14.25 | 03.08 | 15.40 |
| 4. juli | 02.57 | 15.14 | 01.57 | 14.14 | 02.12 | 14.29 | 04.57 | 17.14 | 05.57 | 18.14 | 01.12 | 13.29 | 00.12 | 12.29 | 03.12 | 15.29 | 04.12 | 16.29 | 02.42 | 14.59 | 03.57 | 16.14 |
| 5. juli | 03.32 | 15.51 | 02.32 | 14.51 | 02.47 | 15.06 | 05.32 | 17.51 | 06.32 | 18.51 | 01.47 | 14.06 | 00.47 | 13.06 | 03.47 | 16.06 | 04.47 | 17.06 | 03.17 | 15.36 | 04.32 | 16.51 |

5 707265 100029 >